# UM KOLARANNSÓKNIR Í HVALBA

Eftir *Jóannes Rasmussen.*

*Inngangur.*

Evnið í hesari grein er tær kolalindir, ið eru at finna norðantil í Suðuroy millum bygdirnar Hvalba og Trongisvág. Tær eru at síggja í berginum vestantil á oynni í Prestfjalli og í Grímsfjalli, inni í dalinum suður av bygdini Hvalba og eystur við landinum út á Tjörnunes. Eisini síggjast tær í Hvannhaga og inni á Lónini tætt oman móti sjónum. Suður móti Botnskarði finna vit tær aftur í Geitaskorðagjógv, og í gomlum kolagrövum sæst kol úr Líðarhaga og eystur á Froðbiarnípuna.

Tá Danmarks Geologiske Undersögelse nú í summar tók upp jarðfröðiligar rannsóknir í Suðuroy, mælti Föroya Landsstýri til, at regluligar kolarannsóknir samstundis vórðu settar í verk har suðuri. Eykaútreiðslur til hesar kanningar vórðu játtaðar av Föroya Landsstýri og Föroya Jarðarráð.

Við tað at kolarannsóknirnar bert hava eittans summar á baki enn, fæst eingin heildarmynd. Her verður tí bert sagt frá einstökum fyribrigdum av serstökum týdningi.

Ritgerðir, ið siga frá kolalögum og kolanámi í Suðuroy, eru so mangar, at her verður bert sipað til teirra, ið beinleiðis nema við tað, ið her verður drigið fram.

Tvey ivamál, ið ofta hava verið frammi í seinru árunum og tí lógu fremst fyri í rannsóknum okkara, vóru hesi: Hvussu nógvar kolalindir eru at finna norðantil í Suðuroy? og hvussu eru tey jarðfröðiligu viðurskiftini, har kolalindir eru í fjallinum millum Hvalbiarfjörð og Trongisvág? Hin fyrra spurningin hava vit tikið til umröðu í hesari grein, hin seinri er viðgjördur í aðrari ritgerð, ið er til prentingar.

*Eldri rannsóknir.*

Í einum fronskum bókaverki »Les Gisements de Houille de Suderö« (Paris 1908) hevur útgevarin, *A. Daigre*, savnað saman frágreiðingar og ymsar evnislýsingar Suðuroyarkolinum viðvíkjandi, og aftast í bókini er eitt kort, har tríggjar kolalindir eru strikaðar á. Í bókini verður ofta tikið heldur stórt til, og tykist hon vera skrivað fyri at fáa peningamenn hugaðar fyri kolanámi í Föroyum. Tað er tí mangt, ið má takast við fyrivarni í hesari bók, og hon má vera vandaliga umfarin.

*P. E. Raaschou* (1937) vísir á kortið í hesari nevndu fronsku bók og á eina tekning eftir Th. Nordström har hann sigur fýra kolalindir síggjast í berginum fyri vestan. Sjálvur hevur Raaschou, ið tekur spurningin upp, siglt fram við landinum fyri vestan og eygleitt lindirnar í kikara. Hann sigur seg bert við vissu at hava sæð eina kolalind. Við at bera saman, tað hann sjálvur hevur sæð, tað hann hevur fingið uppspurt á staðnum og tað ið frásagt er í bókmentum, *Johnstrup* (1873), *Ihrmann*, *Nordström*, *Stokes* (Les Gisements de Houille de Suderö 1908), heldur hann tað kortini vera trúligt, at tríggjar kolalindir eru at finna norðantil í Suðuroy, men hann leggur afturat, at hesar tríggjar lindir bert eru sæddar á einum stað — vestur í

Skarð — og at tær eru sæddar nakað burturífrá. Raaschou nevnir, at kanska er ein tjúkkari kolalind at finna í Prestfjalli niðari enn teir nú bróta kol. Hesa heldur hann so vera somu lindina sum Rangabotnskolið, og hann tekur soleiðis til, at kanska er kolanögdin í Föroyum nógv störri, enn vit higartil hava roknað við.

*H. Marstrander* (1950) vísir eisini til áðurnevnda franska bókaverk (1908) og Raaschou (1937), har sagt verður frá trimum, kanska fýra, kolalindum norðantil í Suðuroy. Marstrander heldur líkindi vera til at kolið, ið sæst í kolagrövum norðanfyri Trongisvág, er sama lindin teir bróta í Prestfjalli, men heldur hann hesa lindina vera so ólíka henni, teir bróta sunnanfyri Trongisvág, at hann metir tær ikki at svara saman. Kortini sigur hann, at prógv er einki fyri hesum, og mælir hann til at hetta verður gjöllari kannað. Í frágreiðing sínari vísir H. Marstrander á ein tvörskurð við trimum kolalindum hann hevur latið mátað suðuri í Haga (undir Bergsleiti og uttanfyri Bergsgarð). Niðasta lindin, sigur hann, er á rókini uttanfyri Bergsgarð (hetta er hon sum Johnstrup nevnir) og tvær — við 6 m leir ímillum — sigur hann at vera omaná o. u. 2700 cm högum blágrýtishamara (undir Bergsleiti). Hann heldur at ovasta lindin kanska er Rangabotnslindin, og næsta lindin, eftir öllum at döma, hon teir bróta í Hvalba.

## *Rannsóknir okkara.*

Áðrenn vit greiða frá rannsóknum okkara[1]), eigur eitt sindur at vera sagt um hvussu lagskipanin vanliga er í kolanámunum í Suðuroy. Niðast undir kolinum er ljós leirlind, ið nevnist *banki* ella *bankabotnur*. Undir henni er hella; hon er ofta kullut og botnurin tí ójavnur. Omaná bankanum er kolalind teir nevna *stabbin*. Á stabbanum liggur myrkari leirlind *rannin* nevnd. Omaná rannanum er

---

1) Hjálparmonnum mínum, Asger Berthelsen og Andreas Höjgaard, takki eg hervið fyri gott samstarv.

onnur kolalindin, *kolbandið*, og oman á kolbandinum er leirlind, sum niðari verður nevnd *fúrstin* og omanfyri minuhæddina *tak*. Øll lindin úr hellu í hamar er umleið 10 m hög, stundum nakað lægri og stundum hægri. Tær ymsu fláirnar í lindini eru nakað skiftandi til útsjóndar, men lagskipanin gongur oftast aftur. Eitt tykist eyðkent og tað er, at í Hvalba er stabbin vanliga tjúkkari enn kolbandið, meðan kolbandið í kolanámunum sunnanfyri Trongisvág vanliga er tjúkkari enn stabbin. Lagskipanin tykist oftast at vera ógvuliga greið, men stundum, t. d. í Prestskorum o. aðr., víkur hon kortini nakað frá.

Fyri at fáa álítandi úrslit burtur úr rannsóknum okkara hava vit grivið og mátað tvörskurðir allastaðni har atkomandi var í berginum fyri vestan. Vit hava grivið omanav úr hamri í hamar, so einki skuldi fara burtur ímillum.[1])

Á kortinum (mynd 1) eru kolalindirnar í Prestfjalli og Grímsfjalli avmarkaðar. Tær heilu linjurnar vísa, hvar kolagrevstur er ella hevur verið, og tær beinu linjurnar gjögnum Prestfjall eru tvörgrýti (dykes). Rómartölini siga frá, hvar vit hava mátað tvörskurðir okkara. Í Prestfjalli ganga fláirnar umleið 3° niður í ein eysturhallan norðan. Í Grímsfjalli stava tær meira eysturá og ganga umleið 3° niður í landnyrðing eystan.

*Prestskorar*. Í Skarvgjógv bar til at máta ein tvörskurð frá sjóvarmálanum og allan vegin upp á kolarókina (mynd 2). Hamrarnir uppeftir vóru tjúkkir — teir tjúkkastu upp ímóti 50 m — og úr hörðum blágrýti. Millum hamrarnar lá illska og omaná henni royðugrót. Á *kolarókini* og undir báðum homrunum næst undir henni vóru leirfláir. Hvörki í hesum leirfláunum undir kolarókini ella niðari vóru vit varir við kol.

Á kolarókini gróvu og mátaðu vit ein tvörskurð sunn-

1) Hjálparmenn okkara her vesturi vóru N. P. Norðberg og Peter Næss; teimum og mongum við teimum veiti eg tökk fyri hjálpsemi.




MYND 1. Kolalindir í Prestfjalli og í Grímsfjalli.
*Coal-area in Prestfjall and Grímsfjall.*




MYND 2. Tvörskurður frá sjóvarmálanum og upp á kolarókina í Skarvgjógv.
*Section 0-257 m at Skarvgjógv.*

E. Basalt.
*Basalt.*

D. Kolarókin.
*Coal-bearing strata.*

C. Leir.
*Clay.*

B. Illska og royðugrót.
*Volc. tuff and scoria.*

A. Basalt (Blágrýtishamrar)
*Basalt.*

anfyri og ein norðanfyri Skarvgjógv. Sum frammanundan nevnt er lagskipanin her í skorini ikki fult so greið sum norðari.

Tvörskurður sunnanfyri Skarvgjógv (I):

| | |
|---|---|
| Basalt (255 m o. sj.) | |
| Ljóst leir (banki) ................ | 36 cm. |
| Svart leir (feitur botnur) ......... | 30 cm. |
| Viðakol (viðabular) .............. | 10 cm. |
| Myrkt leir (ovast kolaflísar) ... | 30 cm. |
| Kol (stabbin) .................... | 10 cm. |
| Leir (rannin) .................... | 8 cm. |
| Kol (kolbandið) .................. | 60 cm. |
| Takleir ........................... | 1000 cm. |
| Basalt | |

Ovast í leirinum undir stabbanum sóust tunnar kolaflísar. Í takleirinum sóust eisini flísar og eygu einar 4—5 m uppeftir. Tey vóru frá einum tveimum og upp í 10 cm til tjúkdar; stundum minni og stundum meira enn 1 m til longdar. So langt norður móti Skarvgjógv sum vit eygleiddu lindina bera, vóru viðurskiftini tey somu við einari viðakolaflógv undir stabbanum.

Tvörskurður norðanfyri Skarvgjógv (II):

| | |
|---|---|
| Basalt (240 m o. sj.) | |
| Ljóst leir (banki) ................. | 12 cm. |
| Leir (ovast kolaflísar) ........... | 86 cm. |
| Kol (stabbin) ....................... | 30 cm. |
| Leir (rannin) ...................... | 10 cm. |
| Kol (kolbandið) .................. | 20 cm. |
| Takleir ......................... u. | 1000 cm. |
| Basalt | |

Í teim 16 ovastu cm av leirinum undir stabbanum sóust tunnar kolaflísar. Eisini í niðara parti av takleirinum vóru her kolaflísar. Viðakolið sást einki til her.

Hesir tvörskurðir eru í mangar mátar líkir, men vert er at leggja til merkis, at meðan kolbandið er tjúkkari í tí sunnara — eins og sunnanfyri — er stabbin tjúkkari í tí norðara — eins og norðanfyri —.

*Suður í Haga.* Undir Bergsleiti vóru áður fimm kolaminur, tær vóru allar í brúki til árhundraðskiftið, nú er rutt omanyvir og einki sæst til teirra uttan hina norðastu, ið er atkomandi og enn stendur opin. Tvær tær sunnastu minurnar áttu ognarböndurnir og tvær tær næstu norðureftir áttu kongsböndurnir. Hina norðastu átti Dánjal Ellendersen, hann setti á har eini tvey ár fyri 1900, og úr hesari minuni hava teir tikið kol onkuntíð, heilt upp til 1916—18.[1])

Tað er her frásögn H. Marstranders sigur tvær kolalindir at vera. Tvörskurðurin hann vísir á er o. u. 40 m sunnanfyri norðastu minuna.

Tað var umráðandi at kanna hesi viðurskifti gjölla, og vit gróvu tí omanav aftur og mátaðu lindina. Úrslit okkara var soleiðis (V):

| | |
|---|---|
| Basalt (142 m o. sj.) | |
| Ljóst leir (banki) ................. | 35 cm. |
| Kol (Botnkol 5 cm og stabbi) ... | 50 cm. |
| Leir (rannin) .................... | 18 cm. |
| Kol (kolbandið) ................. | 12 cm. |
| Leir (tak) .......................... | 585 cm. |
| Kol (og leir) ...................... | 50 cm. |
| Leir (tak) .......................... | 170 cm. |
| Basalt | |

Eins og í tvörskurði Marstranders funnu vit í miðjuni eina leirlind, umleið 6 m til tjúkdar. Leirið tóktist í neðra (210 cm) myrkari við tunnum kolaflísum; í erva (375 cm) tóktist tað stundum ljósari. Kolið omaná hesari leirlindini var ikki rættulig kolalind, men skiftandi tunnar

[1]) Hanus Toftheyggj og E. Ellendersen hava sagt mær frá hesum gomlu minunum suðuri í Haga.

fláir av koli og leiri. Norðurá tynnist henda lindin skjótt og einar 25—30 m longur norðuri er hon heilt burtur. Hetta sæst skilliga á mynd 3 og 4, ið sýna ein tvörskurð






MYND 3. Tvörskurður undir Bergsleiti. *Section at Bergsleiti (VI)*. A. Basalt (Blágrýtishamrar). *Basalt*. B. Ljóst leir (banki). *Light coloured clay*. C. Kol (stabbin). *Coal*. D. Leir (rannin). *Clay*. E. Kol (kolbandið). *Coal*. F. Leir (fúrstin). *Clay*. G. Eyrgrýti. *Fluv. conglomerate*. H. Basalt. *Basalt*.

MYND 4. Ljósmynd av tvörskurði undir Bergsleiti. *Section at Bergsleiti*.

beint uttanfyri norðastu minuna (VI); her er eingin ovari kolalind, bert stabbi og kolband.

Lagskipanin her (mynd 3 og 4) er kortini merkilig við tað at tjúkk lind av áar-eyrgrýti (fluviatilt konglomerat) er omaná takleirinum, ið ikki er meira enn 10 cm til tjúkdar. Hetta grýtið er ofta grovur eyrur, men stundum er tað fínari og meiri at kalla sandgrýti. Ovarlaga í eyrgrýtisfláunum eru ofta smá kolaeygu at síggja. Hetta sama kemur fyri aftur vestantil í Grímsfjalli. Hvussu eyrgrýtið ofta er vorðið, sigist ikki betur enn ein gamal Hvalbingur tók til, tá hann segði mær frá, at í kolaholunum suður í Haga líktist grótslagið í takinum stundum grindanýra. Eyrgrýtisfláirnar mega vit skilja soleiðis, at vit her vesturi eru nærindis einum áarósa ella áarósum, har áir hava runnið í tað stóra vatnið kolafláirnar vóru tilgjördar í.

H. Marstrander vísir, sum nevnt, í sama tvörskurði á eina triðju kolalind undir hamrinum inni á rókini uttanfyri Bergsgarð. Hetta er sama lindin Johnstrup (1873) sigur frá. Eisini vit vóru varir við kol inni á hesari rókini (VIII), men lagskipanin er heilt öðrvísi her enn hon er í ovaru lindini. Her sást bert: leir við tunnum kolaflísum og kolakent leir.

Suðuri undir Hælinum vóru fyrr fýra kolaminur. Eisini her suðuri áttu ognarböndurnir tvær og kongsböndurnir tvær. Bert ein mina er opin enn; hon er nakað niðurfallin, men kortini slepst einar 25 m inn í hana. Inni í minuni (6 m inni) var stabbin 70 cm og kolbandið 18 cm (III).

Tvörskurður o. u. 45 m vestanfyri hesa minuna (IV):

| | |
|---|---|
| Basalt (180 m o. sj.) | |
| Ljóst leir (banki) .................. | 75 cm. |
| Kol (stabbin) .................... | 50 cm. |
| Myrkari leir við kolaflísum ...... | 175 cm. |
| Royðuleirgrýti ..................... | 715 cm. |

Her vesturi sást einki til nakað kolband. Inni í berg-

inum her suðuri síggjast stundum klótur og viðakol á markinum upp til hamarin omaná.

*Grímsfjall.* Kolalindin í Grímsfjalli gongur í sjógv eystanfyri Kolaratanga og við lendingina í Hvalba, men her við lendingina sæst kortini einki til nakað kol. Lindin er atkomandi vestantil í Grímsfjalli og á Kolaratanga. Vestanfyri, inni í rygginum í urðini, var áður ein kolamina. Maðurin ið tók kol haðani æt Símun á Hamri. Ein dagin hann var í minuni leyp omanyvir hann og hann doyði.

Ein tvörskurð mátaðu vit so langt inni á rókini, sum gongt var og annan stívar 100 m (tilætlað) sunnari.

Norðari tvörskurður (X):

| | |
|---|---|
| Basalt | |
| Ljóst leir (banki) | 15 cm. |
| Kol (stabbin) | 32 cm. |
| Leir (rannin) | 20 cm. |
| Kol (kolbandið) | 10 cm. |
| Leir (tak) | 20 cm. |
| Eyrgrýti | |
| Basalt | |

Sunnari tvörskurður (IX):

| | |
|---|---|
| Basalt, ovast illska (50 m o. sj.) | |
| Royðugrýti | 200 cm. |
| Ymislitt leir | 400 cm. |
| Leir við heilt tunnum kolaflísum | 100 cm. |
| Basalt | 1300 cm. |
| Ljóst leir (banki) | 15 cm. |
| Kol (viðakol) | 10 cm. |
| Leir (rannin?) | 40 cm. |
| Eyrgrýti | 400 cm. |
| Basalt | |

Í hesum sunnara tvörskurðinum er kol at finna í tveimum hæddum við hamara ímillum. Í niðaru lindini er bert eitt eiti av koli, tunnar flísar ovarlaga í leirlindini millum hamrarnar. Í ovaru lindini er kolið viðakol og nógv tynnri

enn í somu lind norðari; banki er undir, kolband sást einki. Uppi í eyrgrýtinum liggja ofta eygu og flísar.

Tað slepst ikki væl longur niður her norðuri, men nakað sunnari bar til at eygleiða tær næstu lindirnar niðureftir. Undir tí niðara hamrinum í sunnara tvörskurði sást ymislitt leir og royðugrýti og undir triðja hamrinum niðureftir aftur sást um 1 m av royðugrýti. Í hvörgari lindini var kol.

*Kolaratangi.* Á Kolaratanga (XI) er lagskipanin ógvuliga ógreið. Hellan undir kolinum er kullut og óslött; omaná henni sæst ljósur banki, men ikki er altíð líka lætt at skilja ímillum stabba og kolband. Tunnar kola- og leirlindir skifta vanliga upp í hálvt takið. Eins og vestantil í Grímsfjalli tykist kolanögdin nógv minni her enn sunnari.

*Tröllkonugjógvin — Øxlin.* Tað vit vita um kol á hesum leiðum, vita vit frá tveimum royndargravingum, einari við Tröllkonugjógv (XII) og einari í Øxlini (XIII). Við Tröllkonugjógv er öll lindin 9,40 m hög; ikki fekst alt omanav, men vit komu á ljósan banka og stabba. Í Øxlini varð öll lindin lögd ber, hon var 8,70 m hög, men einki sást til kol.

*Inni í dalinum.* Hóast tað at kolalindin er væl kend í kolanámunum á eystursíðuni í Prestfjalli, so var tað kortini neyðugt, at grivið varð omanav allari lindini fyri at vissa sær, at eingin lind var ovari ella niðari millum hesar somu hamrar enn hon, teir nú bróta.

Tvörskurðurin (XV) var soleiðis vorðin:

| | |
|---|---|
| Basalt | |
| Ljóst leir (banki) ................. | 100 cm. |
| Kol (botnkol 15 cm og stabbi) ... | 65 cm. |
| Leir (rannin) ..................... | 20 cm. |
| Kol (kolbandið) .................. | 20 cm. |
| Leir (fúrsti og tak) ............. | 1270 cm. |
| Basalt | |

Bankin lá á hellu, so niðari var eingin lind. Tunnar

kolaflísar sóust *nakað upp í takið, men* kolalind var eingin.

Inni í Rókhaga sigur Johnstrup (1873) at kolalindin er soleiðis til tjúkdar (hæddina o. sj. sigur hann at vera 490 fötur):

| | |
|---|---|
| Nedre Kullag ............................. | 24″ |
| Kulh. Ler ............................. | 7″ |
| Øvre Kullag ............................. | 6″ |

Hetta hóskar reiðuliga væl við royndargraving okkara í Rókhaga, og er hetta ivaleyst sama lindin sum í Prestfjalli:

| | |
|---|---|
| Basalt (156 m o. sj.) | |
| Ljóst leir (banki) ................. | 30 cm. |
| Kol (stabbin) ..................... | 60 cm. |
| Leir (rannin) ..................... | 15 cm. |
| Kol (kolbandið) .................. | 30 cm. |
| Leir (tak) | |

*Nes — Tjörnunes.* Mangir siga seg hava borið eyga við kol eystur móti Tjörnunesi, men siga teir kortini allir frá tunnari lind. Vit hava á hesum leiðum verið varir við kol: Við sjóvarenni eystanfyri Seiðagjógv, millum Seiðagjógv og urðina, millum urðina og Tjörnunes, beint vestanfyri Tjörnunes og beint eystanfyri Tjörnunes. Hetta er alt sama lindin, uttan millum Seiðagjógv og urðina, har tvær lindir sóust við hamara ímillum. Ovara lindin gongur í sjógv beint eystanfyri Tjörnunes; kolið sæst fyri tað mesta í flísum og eygum, ið oftast eru nakrar fáar cm til tjúkdar, hendingaferð sóust eygu umleið 20 cm hög og 1—2 m long. Eisini í niðaru lindini millum urðina og Seiðagjógv liggur kolið í flísum og eygum. Tjúkkasta eygað var einar 10—15 cm til hæddar og umleið 2 m til longdar.

*Lónin — Hvannhagi.* Eisini her eysturi siga mangir seg hava sæð kolið aftur. Bæði inni á Lónini og í Hvannhaga eru tunnar kolalindir at síggja oman móti sjónum. Kolið liggur í flísum og eygum og er til tjúkdar nakað sum tað var um Tjörnunesleiðina. Kolið inni á Lónini og

sunnast í Hvannhaga er sama lindin, hin áðurnevnda ovara. Norðari í Hvannhaga, inni á víkini s. f. Stapan, sóust stundum heilt tunnar kolaflísar, og er hetta helst niðara lindin.




MYND 5. Jarðfröðiligt kort av Hvannhaga og Lónini. Tjúkkar svartar strikur oman móti sjónum: kol. Skákstrikur: Basalt undir kolinum. Prikkar: Innskotið blágrýti (yngri enn kolafláirnar og alt grótslagið omaná). Svartir trýhyrningar: Jarðeldamyrja og illskuböklar (uppkomin av jarðeldaspreinging aftaná at kolafláirnar vóru tilgjördar). Steyrrættar strikur: Basalt omaná kolinum. *Lined (vertical and inclined): Basalt. Black: coal. Dotted: Basaltic instrusions. Black triangles: Volc. breccia and agglomerate.*



MYND 6. Kolalind norðantil í Hvannhaga umvelt av innskotnum blágrýti. *Coal-bearing strata at Hvannhagi destroyed by basaltic intrusion.*

Fláirnar ganga her eysturi umleið 3° niður í ein högan landnyrðing, og tá vit vita, at ovasta kolalindin fer í sjógv eystanfyri Tjörnunes og á Froðbiarnípuni, kann tað kanska tykjast onkrum lögið, at hetta er sama lindin, ið nú er omanfyri sjóvarmálan í Hvannhaga og inni á Lónini.

At hetta kortini er so kemst av, at fláirnar her eysturi eru umveltar og lyftar upp av eldgosum — innskotnum blágrýti — aftaná tað at kolalindirnar og grótfláirnar omaná vóru tilkomnar. Hvussu umvelt alt er her eysturi á leiðini sæst á kortinum og myndunum (mynd 5 og 6).

Sum frammanundan nevnt, er hesin spurningur viðgjördur í aðrari ritgerð og verður hann tí ikki uppafturtikin her.

*Niðurlöga*

Læt okkum nú draga saman úrslit okkara. Í Skarvgjógv, har allar fláirnar sóust berar frá sjóvarmálanum og upp á kolarókina, vóru vit bert varir við kol á kolarókini. Hesa ovastu lindina á kolarókini hava vit eygleitt víða, og vit hava mátað tvörskurðir gjögnum hana alla: Við Geitaskoragjógv, s. f. Skarvgjógv, n. f. Skarvgjógv, suðuri undir Hælinum, undir Bergsleiti, v. f. Grímsfjall, á Kolaratanga, í Øxlini, inni í dalinum fyri eystan Prestfjall, millum Seiðagjógv og Tjörnunes, inni á Lónini og í Hvannhaga; tilsamans 14 tvörskurðir úr hamri í hamar. Umframt hava vit mátað mangar tvörskurðir, har ikki hevur borið til at leggja alla lindina bera á sama stað.

H. Marstrander (1950) vísir, sum frammanundan nevnt, á tvörskurð undir Bergsleiti og sigur at onnur kolalind, ið hann metir til at vera hana, teir bróta í Rangabotni, er at finna ovari millum hesar somu hamrar. Hetta hóskar ikki væl við úrslit okkara við tað at ovara kolalindin, Marstrander nevnir, bert er tað teir plaga at nevna *kol í takinum*. Hon sæst ikki við tvörskurð okkara 40 cm norðari, og ongastaðni heldur hava vit verið varir við nakra ovari lind, men javnan kortini við kol í takinum (eygu og flísar).

Okkara hugsan er tí, at eingin rættulig kolalind er at finna ovari, enn hon, teir bróta í Hvalba.

Johnstrup sigur frá niðari kolalind suðuri í Haga — undir hamrinum undir hesari lindini. Hetta sama ger H. Marstrander (niðasta lindin í nevnda tvörskurði hansara).

Hesa lindina undir hamrinum undir kolarókini hava vit sæð: Í Skarvgjógv, uttanfyri Bergsgarð (suðuri í Haga), v. f. Grímsfjall, í dalinum fyri eystan Prestfjall, í Nesinum, eystanfyri Seiðagjógv og í Hvannhaga. Í Skarvgjógv, inni í

dalinum og í Nesinum sóu vit einki til kol. Uttanfyri Bergsgarð, v. f. Grímsfjall, eystanfyri Seiðagjógv og í Hvannhaga vóru vit varir við tunnar kolaflísar og eygu, men ongastaðni við rættuliga kolalind.

Triðju lindina niðureftir — lindina undir öðrum hamri undir kolarókini — hava vit sæð við Skarvgjógv og á Hvalbiðareiði. Á hvörgum staðnum vóru vit varir við kol.

*Summary*

This paper deals with the coal-seams appearing on the northern part of Suðuroy between Hvalba and Trongisvág (Faroes). The chief problem: »How many seams exist in this area«? goes far back in the past. Reference is made to F. Johnstrup (1873), Th. Ihrmann, Th. Nordström and H. A. Stokes (A. Daigre 1908), P. E. Raaschou (1937) and H. Marstrander (1950) who suggest existence of other workable coal-seams, partly above, partly beneath the coal-horizon where it is now worked in Prestfjall. —

The present investigations which were made on behalf of Geological Survey of Denmark and the Government of the Faroe Isles, come to the conclusion 1) that no real coal-seam exists above the coalhorizon worked in Prestfjall, 2) that the present investigations have found only negligible seams on lower level, 3) that the coal-bearing strata in the eastern area are greatly disturbed by explosive outbursts and intrusions.

BÓKMENTIR

1. *F. Johnstrup:* Om Kullagene paa Færöerne (Kgl. D. Vid. Selsk. Forhandl.. Köbenhavn 1873).
2. *A. Daigre:* Les Gisements de Houille de Suderö (Paris 1908).
3. *P. E. Raaschou:* Om Kulforekomsterne paa Færöerne (Ingeniörvid. Skr. B. Nr. 17. Köbenhavn 1937).
4. H. *Marstrander:* Report on the Coal Position on the Faroe Islands. 1950. Óprentað rit.